# Pizza 67 letur upp í Klaksvík

**Seint í hesu vikuni letur eitt nýtt pizzaria upp í Klaksvík. Pizza 67 hevur leigað hølini frá Michael Olsen á Fornagørðum, og ætlanin er fyrst og fremst at satsa upp á tey, ið ynskja matin koyrdan heim**

PIZZARIA

*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Pizza 67 letur nú upp pizzaria á Fornagørðum í Klaksvík, har Michael Olsen í mong ár hevur havt grill og café. – Vit fara at leggja okkum eftir at koyra matin út til fólk, siga teir báðir Høskuldur og Hallbjørn, sum eiga Pizza 67*

**Klaksvík:** Í endanum av hesari vikuni kunnu klaksvíkingar fara inn á tað næsta pizzaria, sum letur upp í býnum. Aðrar matsølur hava eisini pizza til sølu, men tað eru tvey matstøð, sum leggja seg mest eftir at selja pizza. Enn er tó ikki heilt greitt, hvønn dag í vikuni tað letur upp, men tað er heilt víst, at tað verður í hesi vikuni.

Teir báðir Høskuldur Pálsson og Hallbjørn Thórsson, sum eiga Pizza 67 í Havn siga, at teir longi hava hugsað um at víðka um teirra virksemi. Pizza 67 hevur nú verið í Havn í seks ár, men teir hugsaðu ikki fyrst og fremst um Klaksvík, tá ætlanin um at víðka virksemið av fyrstan tíð kom fram.

– Men vit hava so verið her norðuri og hugt okkum um og leitað eftir hølum. Tað eru góðir møguleikar í hesum hølunum, sigur Høskuldur.

Hølini eru gjørd soleiðis, at tað ber til at standa inni og eta, um ein ynskir tað, men ongi borð ella stólar eru til taks.

Teir fara í fyrstu atløgu ikki at satsa upp á kundar, sum koma inn at eta, siga teir báðir, men heldur upp á útkoyring, sum ikki er so vanlig í Klaksvík. Ætlanin er, at treytað av at fólk keypa fyri meira enn 100 krónur, so kunnu tey fáa matin koyrdan heim til sín, um tey ynskja tað.

Men tó so - okkurt um tíggju fólk kunnu standa inni í hølunum og eta samstundis.

Broytingarnar í mun til hvussu tað sá út, meðan Michael hevði café og grill, eru stórar. Øll caféin er broytt, so at ein stórur partur av henni er farin til køkin, meðan hin parturin verður staðið, har fólk kunnu standa og eta. Onki er broytt í erva, men tey hølini kemur Pizza 67 ikki at nýta, sambært teimum báðum Høskuldi og Hallbjørn.

Teir halda ikki, at marknaðurin sum er, er stórur í Klaksvík, men tað vænta teir kemur.

– Tað tekur tíð at venja fólk, men tað kemur nokk, siga teir og leggja afturat, at desember er ein góður mánaður at lata upp í, tí tá eru fólk ofta sera upptikin og hava ikki so góðar stundir til at gera mat.

Pizza 67 letur sum sagt upp hósdagin. Opið verður frá klokkan 17 til 23 gerandisdagar og frá klokkan 17 til 05 leygar- og sunnunátt.

# Svínoyar bygdarráð skipað seg

Á fundi hóskvøldið skipaði komandi bygdarráðið í Svínoy seg við Eyðuni Jacobsen sum borgarstjóra í Svínoy eftir 1. januar.

Næstformaður verður Jógvan Edmund á Geilini, meðan triði limurin er Jakoba Bech. Hon er nývald, meðan hinir báðir eru afturvaldir. Pól Sundsskarð, sitandi borgarstjóri, valdi ikki at stilla upp aftur til kommunuvalið, og fer hann sostatt frá tann 31. desember.

Í tíðindaskrivi sigur nýggja bygdarráðið, at tey ynskja at takka øllum, sum vóru við til at velja komandi bygdarráðið.

**- sae -**

## Trý fólk á skaðastovuna

Um midnáttarleitið fríggjakvøldið hendi eitt ferðsluóhapp í miðbýnum í Havn. Ein bilur kom oman eftir Bøkjarabrekku og ein annar niðan eftir Niels Finsensgøtu. Hesin seinni bilurin koyrdi beint út fyri tann, ið kom oman eftir Bøkjarabrekku og stoyturin var ógvusligur. Trý fólk vórðu flutt á Landssjúkrahúsið. Tann eini persónurin varð innlagdur til observatión, meðan hini báðir sluppu heim. Bilarnir fingu stóran skaða, og Sløkkiliðið flutti teir burtur.

**- sae –**

## Herverk á skúlar

Løgreglan í Havn fekk fráboðan um herverk á Argja skúla. Fráboðanin kom leygardagin, og talan var um ein brotnan rút. Ein rútur varð somuleiðis brotin í Venjingarskúlanum. Blóðspor vóru at síggja inni í skúlanum, men ongi tekin vóru tó um, at nakað var stolið.

Annars sigur vakthavandi, at tað ikki vóru so nógvir trupulleikar av fullum fólki um vikuskiftið.

– Leygarkvøldið var eitt jólafrokostkvøld, men hóast tað var ikki meira at gera enn eitt vanligt leygarkvøld, sigur vakthavandi.

Ein varð tikin inn á støðina at sova rúsin av sær, og løgreglan koyrdi eisini fleiri heim.

**- sae –**

## Mistu streymin

Sunnumorgunin varð Sløkkiliðið sent út á Landavegin í Havn, tí eldur var í einum el-skápi. Talan var um eitt skammlop, og neistarokið stóð frá tí. Nøkur húsarhald í økinum mistu streymin, men fingu hann tó skjótt aftur.

Í Klaksvík var eisini ein lítil eldsbruni fráboðaður um vikuskiftið. Eldur var komið í eitt lampustað tíðliga sunnumorgunin í einum sethúsum. Tað kundi staðist stórur skaði av tí, men tíbetur varnaðist húsaeigarin, at ein sikring brast og luktin. Hann fekk sær fatur á einum eldsløkkjara og fekk fyribyrgt eldsbrunanum, áðrenn Sløkkiliðið kom á staðið.

**- sae –**

## Bilstuldur

Sunnudagin fekk løgreglan í Klaksvík fráboðan um, at ein bilur var stolin. Eigarin fann tó bilin aftur sjálvur. Hann stóð í grótbrotinum í Norðdepli.

Á setrinum í bilinum lá ein rifla, tá hann varð stolin, men hon var ikki í bilinum, tá eigarin fann hann aftur. Tjóvurin hevði tikið hana við sær, tá hann fór úr bilinum. Løgreglan fann út av, hvør tjóvurin var, og hann verður ákærdur fyri at hava stolið lyklarnar til bilin, bilin sjálvan og at hava koyrt uttan koyrikort. Hartil verða bæði tjóvurin og bileigarin ákærdir fyri brot á vápnalógina.

– Tað krevst eitt serligt loyvi til at eiga riflu. Tjóvurin verður so ákærdur fyri at hava tikið hana, og bileigarin fyri at hava latið hana ligið í bilinum. Tað er jú heldur ikki lógligt, men tíbetur var riflan ikki lødd, sigur vakthavandi í Klaksvík.

Tveir bilar vórðu stolnir í Eysturoynni um vikuskiftið. Fríggjakvøldið varð ein vøruvognur stolin í Norðragøtu. Hesin varð funnin aftur á Skálatrøð í Havn sunnukvøldið. Bilurin var punkteraður, men annars var ongin skaði á honum. Sunnu-náttina varð ein bilur stolin í Fuglafirði, og hann var funnin aftur seinni sunnudagin í Fuglafirði. Nakað av skaða var á bilinum. Løgreglan veit ikki, hvør hevur stolið hesar bilarnar.

**- sae –**


merko JÓLAKALENDARIN

*Týsdagur 7. desember 2004*

*Mars, Bounty, Snickers*
*Frítt val*
*4 stk.*
20⁰⁰



*SKÆLSKØR*
*kirsuberjasós*
*500 gram.*
7⁷⁵



*Hamburgarryggur*
*fyri kilo*
49⁹⁵



merko merko merko



SPURNINGUR
Hvussu kallast danska flogfelagið, ið byrjar at flúgva til Føroya í desember ?

Tilboðið er bert galdandi týsdagin 7. desember

SVAR

Drigið verður 29. des. millum allar innkomnar seðlar í jólamánaðinum. Vinningurin er ein Apex ferðaseðil til Danmarkar (aftur og fram) íroknað ferðaavgjald.
Seðilin kann avleverast við kassan í einum av MERKO handlunum



NAVN & TELEFON NUMMAR